# Danski umhvørvismálaráðharrin vitjar

Seinnapartin í gjásr kom danski umhvørvismálaráðharrin Hans Christian Schmidt á vitjan hjá Eyðun Elttør, landsstýrismanni í umhvørvismálum.

Vitjanin er komin í lag, eftir at havumhvørvismál í januar mánaði vóru yvirtikin sum føroyskt málsøki. Í sambandi við yvirtøkuna avtalaðu umhvørvis-málaráðharrin og landsstýrismaðurin, at ein samstarvsavtala skuldi gerast millum donsku og føroysku umhvørvisfyrisitingarnar.

Á vitjanini, sum varar í 4 dagar, skulu umhvørvismálaráðharrin og landsstýrismaðurin undirskriva samstarvsavtaluna.

Umframt fundir við landsstýrismannin í umhvørvismálum, skal umhvørvismálaráðharrin vitja veðurstøðina á Sornfelli, og deildina fyri Arbeiðs- og Almennaheilsu, har kunnað verður um kviksilvur og PCB kanningarnar.

Leygardagin verður farið til Klaksvíkar og Viðareiðis.

Vitjanin endar sunnudagin 27. apríl.



*Tá havumhvørvismál vórðu yvirtikin í Keypmannahavn í januar, avtalaðu umhvørvismálaráðharrin og landsstýrismaðurin í umhvørvismálum, at ein samstarvsavtala skuldi fáast í lag millum donsku og føroysku umhvørvisfyrisitingingarnar. Myndirnar er frá løtuni tá Eyðun Elttør og Hans Christian Schmidt umhvørvisráðharrar hittust í Keypmannahavn í januar í sambandi við at umhvørvismálini vórðu yvirtikin*




# Merkið veitra hvønn dag í Tinganesi

**Tíðindaskriv**

**Í morgin, flaggdagin, kemur nýggj kunngerð um flagging frá landsins bygningum í gildi. Sambært kunngerðini verður flaggað hesar dagar:**

| | |
|---|---|
| 1. januar | Nýggjársdagur |
| 6. februar | Samiskur flaggdagur |
| 8. mars | Altjóða kvinnudagur |
| 12. mars | Grækarismessa |
| 23. mars | Norðurlandadagur |
| Langi fríggjadagur | (á hálvari stong) |
| Páskadagur | |
| 16. apríl | Føðingardagur drotningarinnar |
| 25. apríl | Flaggdagur |
| 1. mai | Altjóða arbeiðaradagur |
| 17. mai | Tjóðardagur Noregs |
| Kristi himmalsferðardagur | |
| 26. mai | Føðingardagur krúnprinsins |
| Hvítusunnudagur | |
| 5. juni | Grundlógardagur Danmarkar |
| 6. juni | Tjóðardagur Svøríkis |
| 9. juni | Tjóðardagur Álands |
| 17. juni | Tjóðardagur Íslands |
| 21. juni | Tjóðardagur Grønlands |
| 24. juni | Jóansøka |
| 28. juli | Ólavsøkuaftan |
| 29. juli | Ólavsøkudagur |
| 24. oktober | Dagur Sameindu tjóða |
| 1. november | Minningardagur teirra sjólátnu (á hálvari stong) |
| 6. desember | Tjóðardagur Finnlands |
| 25. desember | Jóladagur |

Høvuðsbroytingin er, at umframt hesar dagar verður flaggað við Merkinum hvønn dag í Tinganesi, á sjálvum nesinum.

Á tjóðar-/flaggdøgum brøðratjóðanna í Norðurlondum verður í Tinganesi – umframt Merkið á nesinum – flaggað á Bakkapakkhúsinum við flagginum hjá brøðratjóðini.

**Í Tinganesi, 24. apríl 2003**

**Løgmálaráðið**

ítróttur

Nr. 78 • fríggjadagur • 25. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Marit millum tey fremstu í Danmark

**Marit Magnussen tók fyri stuttum lut í DM-kappingini í fimleiki, og ikki kann sigast annað, enn at úrslitini vóru góð**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*

Fyri góðari viku síðan skuldi Danmarksmeistaraheiti í fimleiki fyri kvinnur avgerast. Millum luttakararnar hesaferð var eiwsini fremsta føroyska fimleikakvinnum, Marit Magnussen.

Síðani luttøkuna á Oyggjaleikunum á Isle og Man fyri tveimum árum síðani, hevur Marit gingið á Skúla í Nakskov á Lollandi, og her hevur hon eisini havt umstøður at gera rættiliga nógv við fimleikin.

Stóra málið hevur alla tíðina verið komandi Oyggjaleikirnir á Guernsey, men talan hevur sjálvandi eisini verið um kappingar av ymsum slag í Danmark, og ikki kann sigast annað enn, at úrslitini her hava verið góð.

Fyri knøppum mánaði síðani tók hon lut í kappingini meistaraheitið á Sælandi. Ta ferðina varð úrtøkan eitt triðja pláss í lopi um hest og barru. Á gólvinum hevur vanliga ligið væl fyri hjá Marit, og her gjørdist tað talan um eitt annað pláss.

Næst seinasta vikuskifti var so DM-kappingin, og heldur ikki her smæddist Marit burtur. Leygardagin varð einstaklingakappingin hildin, meðan stakgreinakappingin var á skránni sunnudagin. Leygardagurin endaði við einum triðja plássi, og tí hevði Marit góðar vónir undan sunnudegnum.

Í lopi um hest gjørdist talan um eitt triðja pláss, og tá hetta varð endurtikið í barruni, er einki at siga til, at Marit sjálv var væl nøgd. Hetta er nevnliga ein grein, sum hon ikki hevur íðkað, fyrr enn hon flutti til Danmarkar.

Størstur mundi spenningurin tó vera um gólv-seriuna, har vónirnar vóru um eitt gullmerki, men hetta varð so av ongum. Í fyrstu lopseriuni datt Marit nevnliga, og so var tann møguleikin fokin.

Samanum tikið var tó talan um eitt framúr avrik av Marit, og einki er at ivast í, at hon fer at teljast millum stóru føroysku gullvónirnar, tá farið verður til Guernsey um tveir mánaðir.

*Hóast tað kiksaði á gólvinum, har vónirnar annars vóru størst, so var talan um framúr góð úrslit, tá Marit Magnussen herfyri tók lut í DM-kappingini í fimleiki*



